KÍ-GÍ 1-0 (0-0):

# KÍ fekk alt ímóti sera skaðaplágaða GÍ



*Bartal Eliasen hjá GÍ takklar Arnhold Joensen hjá KÍ. Klaksvíkingar fóru avstað við einum teprum 1-0 sigri*

*Mynd: Símun á Høvdanum*

**Av tí at tað bara eina ferð eydnaðist at fáa mál burturúr yvirvágini spøkti møguleikin fyri, at GÍ skuldi javna støðugt, og síðsta bríkslið kendist tískil sum sannur lætti hjá heimaliðnum**

KÍ-GÍ
*Jóannes Hansen*

Stóri spurningurin hjá gøtumonnum, áðrenn teir fóru um fjørðin, var, um teir yvirhøvur vóru førir fyri at bjóða av við ellivu spælarum. Tað eydnaðist, men tað kom sera illa við, at Popczynski sjálvur ikki var førur fyri at spæla og harvið legðist afturat øllum hinum, sum nú skulu royna at koma fyri seg, so teir verða førir fyri at spæla ólavsøkudag, tá ið kappingarárið skal bjargast í steypafinaluni.

- Avbjóðingirnar ímóti GÍ kennast altíð sum serligar lokaluppgerðir. Tá verður ikki hugsað so nógv um polerað spæl, men tað ræður um at vinna, so liggur vertin á, hvussu stigini koma til høldar.

Soleiðis søgdu KÍ spælararnir undan mikukvøldinum, og teir mundu neyvan vera ósamdar við seg sjálvar, tá ið Birgir Sondum, sum megnaði væl at halda skil á, hevði brikslað fyri síðstu ferð. KÍ hevði vunnið 1-0, teir høvdu fingið týdningarmiklu stigini, soleiðis at teir framvegis hava møguleika at blanda seg millum tey bestu, og leikliga avrikið hevði ikki verið at rópa hurrá fyri og ikki av tí kalibrinum, sum klaksvíkingarnir vístu sunnudagin, tá ið teir einki stig fingu burturúr.

## Leitaðu eftir dynamikkinum

Viljin til at seta eyka guvu undir spælið tóktist búgva í heimamonnunum, men teir høvdu ilt við at toga seg sjálvar upp og harvið at fáa tað kropsliga yvirskotið í spælið, sum skuldi til fyri at seta nógvu óroyndu GÍ spælararnar so at siga upp á pláss.

KÍ hevði bóltin meiri alla tíðina, men í fyrra umfarinum vóru málmøguleikarnir fáir og smáir. Onkra ferðina komu teir til baklinjuna í høgru og løgdu innfyri, uttan at nakað spurdist burturúr. Næst við vóru teir, tá ið Hjalgrím Elttør sneiddi seg til baklinjuna í vinstru, sneiddi framvið baklinjuni og roynd úr fimm metrum at leggja út frá, men tá varð taklað út til horna.

Sunnudagin ímóti HB sat Eyðun Klakstein á beinkinum alla tíðina. Tað tóktist undarligt, at hann ikki varð settur á vøllin síðstu løtuna, tá ið tað mesta gekk fyri seg í HB brotsteiginum, og tað var brúk fyri knøppum og óvæntaðum dragingum fyri at vinna málmøguleikan og kanska brotssparkið, sum skuldi til.

Hesa ferð varð Eyðun Klakstein settur inn beinanvegin í 2. hálvleiki, og tað var henda disopsitiónin, sum gjørdi munin. Eyðun var sera væl upplagdur, samanspælið í vinstru gjørdist gott, og tað kom tyngd í hetta borðið. Eftir uppspæl í vinstru stóðust einar tríggjar góðar støður burturúr, og Eyðun hevði sjálvur tann besta, men GÍ málverjin bjargaði til horna.

Úr høgru vórðu bóltarnir ofta í 2. hálvleiki sendir aftarlaga frá og í brotsteigin, har teir oftast vóru barnamatur hjá Bartali Eliasen. Men tað var júst eftir eina sovorna sending, tá ið tað restaði eitt stórt korter, at KÍ fekk einasta málið. Eyðun Klakstein dró úr vinstru og tvørturum, sneiddi framvið tveimum, áðrenn hann legði út til Harley Bertholdsen, sum sendi langt og høgt til handara stólpan, har Ove Nysted, sum annars var merkiliga tamur og lítið fokuseraður, vann luftkríggið og drønstútaði dygst undir tvørtræið.

Tað lætnaði hjá heimaliðnum, sum næstu minuttirnar royndi at økja um leiðsluna, men tað eydnaðist ikki, og so sigldu teir vandasjógv síðstu løtuna.

## Eingin broddur

Fyritreytirnar gjørdu, at gøtumenn vóru nøgdir við málleysan javnleik. Teir royndu fleiri ferðir í 1. hálvleiki at flyta nógv fólk fram á vøllin, tá ið teir fóru í snarálop, men tað var ov lítil tyngd og broddur í. At fyrst Gidek og síðani liðformaðurin Poul Ennigarð í 2. hálvleiki noyddust at taka seg úr stríðnum - tann seinni eftir samanstoyt í luftdysti - var sjálvandi steinur oman á byrðu.

Tá ið KÍ var komið á odda, og tíðin gekk undan, broyttist gongdin, soleiðis at heimaliðið vardi, og GÍ fekk tiltuskað sær hornaspørk og frísparksinnlegg. Bartal Eliasen var fremsti maður, men teir komu ongantíð í støðuna, sum kundi bera mál við sær. Næst við at fáa mál vóru teir tíðliga í 2. hálvleiki, tá ið langt og høgt spark støkk í vøllin og upp um hesa ferð ikki serliga sannførandi KÍ málverjan, sum kortini megnaði at fáa bóltin aftur, áðrenn skaði stóðst av.

Skulu illa plágaðu gøtumenninir síggja nakra nyttu í stríðnum, sum teir vóru partur av við so skerdari manning, so má tað vera, at royndirnar fara at bera nyttu við sær seinni. Men tað man vera ilt at síggja nakað hugaligt í tí júst nú.

### KÍ-GÍ 1-0 (0-0)

1-0: Ove Nysted 72.
**Dómari:** Birgir Sondum
KÍ: Kartin Joensen - Harley Bertholdsen, Niclas Niclassen, Aleksander Djordjevic, Símun Joensen - Arnhold Joensen, Atli Danielsen, Jan Joensen, Leon Bjartalíð (Eyðun Klakstein, 46.) - Hjalgrím Elttør, Ove Nysted
**Gult kort:** Ove Nysted, Símun Joensen
**GÍ:** Jacek Przybylski - Poul Ennigarð (Anton Skoradal, 70.), Leivur Hansen - Jónreid Dalheim, Høgni Madsen, Súni Olsen, Gidek (Henning Jarnskor, 55.), Bárður á Lakjuni - Áslakur R. Petersen, Magnus Skoralíð (Páll Rói Poulsen, 81.)
**Gult kort:** Bartal Eliasen, Høgni Madsen



# Størri tyngd í toftamonnum



*Súni Fríði Johannesen skoraði sítt triðja og fjórða landskappingarmál í dystinum móti EB/Streymi mikukvøldið. B68 hevur við sigrinum framvegis samband við oddaliðini*

*Savnsmynd*

**Men tað var ikki fyrrenn stutt undan leikloki, at tað var greitt, at stigini skuldu verða á Svangaskarði, og at gestirnir, sum høvdu havt onkrar góðar støður, einki skuldu fáa**

B68-EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

Tað var gott lag á Toftum mikukvøldið. Trý stig komu til høldar ímóti EB/-Streymi, og harvið verður B68 við í stríðnum um heiðursmerkini, tá ið tað eftir mánaðarskiftið verður farið undir aftur landskappingina.

Men tað tók sína tíð, áðrenn tað var greitt, at heimaliðið skuldi vinna. Tá stórur tími var farin, gekk - so segði hann - av báðum endum. Innanfyri eitt korter vórðu fimm mál skorað, og EB/Streymur var leingi væl við. Tá støðan var 2-2, hevði Sorin Anghel góðan møguleika at leggja EB/-Streym á odda. Hann var einsamallur við B68 málverjanum, sum hann royndi at draga framvið. Men hann kom ov langt út í borðið, og so varð vinkulin ov spískur, og einki spurdist burturúr.

Eina aðra ferðina gjørdist Ronnie Samuelsen púra leysur. Hann tóktist vera rættuliga frammarlaga og ivaleyst rangstaddur, men floytan segði einki. So var spenningurin stórur, men einki spurdist burturúr, tí Albert Sævarsson vann tvídystin. At B68 málverjin var stinnur og sannførandi kom enn eina ferð B68 sera væl við.

## Bílig mál

Talan var um nógvar nærdystir, og tá var tað týðuligt, at tyngdin í heimaliðnum var størri, enn hon var hjá mótstøðumonnunum. Øssur Hansen var noyddur at taka seg aftur í steðginum, men tað tóktist ikki bila so nógv, tí B68 miðvøllurin, sum sammett við tann hjá mótstøðuliðnum var yvirmannaður - teir vóru tríggir sentralt í 3-5-2 uppstilling, meðan mótstøðuliðið var í 4-4-2 uppstilling, var fyri tað mesta omaná.

Í 1. hálvleiki kom eitt mál, tá ið lítil hálvur tími var farin. Tá var lotið, sum B68 hevði undan, einki at tosa um, og málið var rættuliga bíligt. John Heri Dam gyppaði høgt og langt miðskeiðis av mótstøðuhelvtini í vinstru og heilt frá síðulinjuni. Bólturin fór heilt høgt, áðrenn hann dalaði niður frammanfyri tvørtræið og aftanfyri málverjan og so var 1-0.

Seinna umfarið var átjan minuttir gamalt, tá ið tað aftur var javnt. Og aftur hesa ferð var talan um støðu, har mótstøðuliðið hjálpti væl til. Dánial Hansen, sum eftir tvey mál ímóti VB var afturvaldur sum álopsspælari hjá B68, var í egnum brotsteigi fyri at hjálpa til, tá ið fríspark varð sent innfyri. Men álopsmaðurin var so mikið óheppin, at hann við høvdinum snittaði bóltin í málið aftanfyri sín egna málverja.

So var EB/Streymur aftur í støðuni, sum teir høvdu viljað hugsað sær, men tað gingu bara tveir minuttir, so var aftur mótbrekka. B68 fríspark dygst uttanvert brotsteigarmarkið varð trillað upp á tvørs til Fróða Benjaminsen, sum lyfti í bleytan boga upp um manngarðin og dygst inn undir samankomingina.

B68 var harvið frammanfyri 2-1, men mótið svann ikki úr gestunum. Fimm minuttir seinni høvdu teir fríspark, sum Egil á Bø trillaði upp á tvørs til Magna á Lakjuni, sum smekkaði til. Vart varð fyri, men EB/Streymur varðveitti álopið, og so eydnaðist tað miðvallaranum í høgru, Marna Djurhuus, at skjóta eitt sera vakurt mál og harvið at javna til 2-2. Han dró eitt sindur upp á tvørs, gjørdi einar tvær skotfintur, og so lyfti hann í bleytum boga í málið.

Harvið tóktist alt aftur púra opið, gestirnir fegnaðust, men tað mundu teir gera í so nógv av. Minuttin eftir var aftur mál til B68. Hesa ferð var Súni Fríði Johannesen fyrstur á returbóltinum, eftir at ikki serliga harðlig roynd ímóti málinum í bleytum boga hevði siglt í tríkantssamankomingina, áðrenn bólturin stakk í vøllin inni undir málinum.

Hjá EB/Streymi var tað líka mikið, um teir taptu við einum ella tveimum málum. Teir spentu síðstu løtuna álopsbogan, men hann brast. Álopini hjá teimum gjørdust ikki heilt vandamikil, tí teir fyri tað mesta oystu langar sendingar fram í B68 brotsteigin, har Hans Fróði Hansen, Arnbjørn Danielsen og Jákup Eli Olsen høvdu gott tak á - ikki minst í luftkrígnum. Tólv minuttir undan dystarenda staðfesti heimaliðið sigurin, og aftur var talan um eitt sindur margháttligt mál. Eftir innlegg úr høgru og afturum handara stólpan stútaði Súni Fríði Johannesen heilt bleytt. Málverjin fylgdi aftaná bóltinum, men gjørdi einki við hann, og so brast bólturin í handara stólpan, áðrenn hann støkk inn um strikuna til 4-2.

Hjá EB/Streymi sum hjá so mongum øðrum mundi tað koma væl við, at hetta var síðsta ferðin undan summarsteðginum. Í 2. hálvleiki fóru spælarar hjá teimum tvær ferðir av vøllinum, tí teir vóru skaddir í nærdysti.

### B68-EB/Streymur 4-2 (1-0)

1-0: John Heri Dam 28.
1-1: sjálvmál 63.
2-1: Fróði Benjaminsen 65.
2-2: Marni Djurhuus 70.
3-2: Súni Fríði Johannesen 71.
4-2: Súni Fríði Johannesen 78.
**Dómari:** Páll Augustinussen
**B68:** Albert Sævarsson - Arnbjørn Danieslen, Hans Fróði Hansen, Jákup Eli Olsen - Bogi Petersen (Kristian Anton Andreasen, 88.), Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen (Jóhan Petur Poulsen, 46.), John Heri Dam (Mannbjørn Nesá, 84.) - Súni Fríði Johannesen, Dánial Hansen
**Gult kort:** Fróði Benjaminsen, Arnbjørn Danielsen, Jann Ingi Petersen
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig - Hallur Jacobsen (Esmar Eiðisgarð, 55.), Egil á Bø, Gert Hansen, Eyðfinn Joensen - Marni Djurhuus (Jákup Martin Joensen, 89.), Ronnie Samuelsen, Marek Vierzbicki, Magni á Lakjuni - Hans Pauli Samuelsen (Bárður Olsen, 80.), Sorin Anghel
**Gult kort:** Marni Djurhuus